

# Vend kemur í hjá oljuvinnuni í 2016 sigur norski tjóðbankin

**Jógvan Hugo Gardar**

21.06.2015 - 23:01

Oljan.fo

Tað er sera ófriðarligt í oljuídnaðinum í løtuni, og nógv fólk eru søgd úr starvi. Bara í Noregi eru minst 22.000 størv í oljuídnaðinum horvin hetta farna árið. Framtíðarútlitini tykjast døkk.

Men teir greinararnir sum hyggja eitt sindur longur inn í framtíðina halda seg síggja glottar, og hesir kunnu vera størri enn teir tykjast í dag.

Norski tjóðbankin hevur hugt nærri eftir hvussu útlitini eru fyri nýggjum íløgum í oljuvinnuni, og hesar foirsøgnurnar eru meir jaligar nú, enn tær vóru fyri stuttum.

Tjóðbankin hevur í vetur sagt at íløgurnar fara at falla minst við tíggju prosentum í 2016, men nú heldur bankin seg síggja eina meir jaliga gongd, og sigur at íløgurnar fara at falla við umleið fimm prosentum í 2016, samanborið við í ár.

Tøl hjá norsku hagstovuni, SSB, vísa eisini at íløgurnar fara ikki at falla so nógv sum ein higartil hevur mett.

Norski tjóðbankin sigur í síni meting at íløgurnar í oljuídnaðinum minka við 15 prosentum í ár, og tað er tað sama sum bankin áður hevur sagt. Í 2017 roknar bankin við 2,5 prosent minking í íløgunum. Tað eru fimm prosent minni lækking enn mett áður.

Hinvegin verður eingin vøkstur í íløgunum í 2018